# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 20.01.2025 |
| Mál nr.: | - |
| Málsviðgjørt: | - |
| Ummælistíð: | 21.01.2025 til 07.02.2025 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning**
(Fylgibroytingar orsakað av dagførdari toll- og vøruskrá)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 19. desember 2023, verður skjal 1 broytt sum ásett í skjali 1.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juni 2025.

**Skjal 1**

Í frumskjali 1 til toll- og vøruskránna í skjali 1 til løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 verða hesi vørunummur sett inn:

| Vøru nr. | Punkt avgjald | Punkt avgjald | Vøruslag |
|---|---|---|---|
| 2202.10.20 | 0 | 2,00 kr. pr. ltr. | Orkudrykkur |
| 2208.20.16 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Brandy de Jerez |
| 2208.20.18 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Singani o.tl. |
| 2208.20.19 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Pisco o.tl. |
| 2208.20.28 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Aðrar grappa vørur |
| 2208.20.66 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Brandy ella Weinbrand yvir 2 litrar |
| 2208.20.69 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Singani, pisco o.tl. yvir 2 ltr. |
| 2208.20.88 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Aðrar grappa vørur yvir 2 ltr. |
| 2403.99.20 | 0 | 144,00 kr. pr. kg. | Skrá |
| 2403.99.30 | 0 | 144,00 kr. pr. kg. | Snús sum inniheldur tubbak |
| 2403.99.40 | 0 | 144,00 kr. pr. kg. | Snús sum ikki inniheldur tubbak |
| 2404.11.00 | 0 | 215,00 kr. pr. kg. | Við tubbakki ella eftirgjørdum tubbak |
| 2404.12.00 | 0 | 215,00 kr. pr. kg. | Onnur vøra sum inniheldur nikotin |
| 2404.19.90 | 0 | 215,00 kr. pr. kg. | Onnur vøra |
| 2710.12.50 | 0 | 3,00 kr. pr. ltr. | Blýggjað bensin yvir 0,013 g. pr. ltr. |

Í frumskjali 3 til toll- og vøruskránna í skjali 1 til løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 verða hesi vørunummur sett inn:

| **Vøru nr.** | **Punkt avgjald** | **Punkt avgjald** | **Vøruslag** |
|---|---|---|---|
| 0403.20.11 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. max 3% feitt uttan sukur |
| 0403.20.13 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. max 6% feitt uttan sukur |
| 0403.20.19 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. yvir 6% feitt uttan sukur |
| 0403.20.31 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. max 3% feitt við sukur |
| 0403.20.33 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. max 6% feitt við sukur |
| 0403.20.39 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. yvir 6% feitt við sukur |
| 0403.20.41 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt sum inniheldur mjólkafeitt max 1,5 %, av saccharose (herundir invertsukker) ella av isoglucose max 5%, av glucose ella stívilsi max 5% |
| 0403.20.49 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Annað |
| 0403.20.51 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. max 1,5% feitt |
| 0403.20.53 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. max 27% feitt |
| 0403.20.59 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. yvir 27% feitt |
| 0403.20.91 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. max 3% feitt |
| 0403.20.93 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t.max 6% feitt |
| 0403.20.99 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. yvir 6% feitt |

Í frumskjali 1 til toll- og vøruskránna í skjali 1 til løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 verða hesi vørunummur strikað:

| **Vørunummar** | **Punkt avgjald** | **Punkt avgjald** | **Vøruslag** |
|---|---|---|---|
| 2208.20.27 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Brandy de Jerez |
| 2208.20.29 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Singami, Pisco o.tl. |
| 2208.20.40 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Rådestillat |
| 2208.20.64 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Armagnac yvir 2 litrar |
| 2208.20.87 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Brandy yvir 2 litrar |
| 2208.20.89 | 0 | 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol | Singami, Pisco o.tl. yvir 2 ltr. |
| 2403.99.10 | 0 | 144,00 kr. pr. kg. | Skrá og snús |
| 2710.12.51 | 0 | 3,00 kr. pr. ltr. | Blýggjað bensin yvir 0,013 gr. pr. ltr. undir oktan 98 |
| 2710.12.59 | 0 | 3,00 kr. pr. ltr. | Blýggjað bensin yvir 0,013 gr. pr. ltr. yvir oktan 98 |

Í frumskjali 3 til toll- og vøruskránna í skjali 1 til løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 verða hesi vørunummur strikað:

| **Vørunummar** | **Punkt avgjald** | **Punkt avgjald** | **Vøruslag** |
|---|---|---|---|
| 0403.10.11 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. max 3% feitt uttan sukur |
| 0403.10.13 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. max 6% feitt uttan sukur |
| 0403.10.19 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. yvir 6% feitt uttan sukur |
| 0403.10.31 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. max 3% feitt við sukur |
| 0403.10.33 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. max 6% feitt við sukur |
| 0403.10.39 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Reint yogurt o.t. yvir 6% feitt við sukur |
| 0403.10.51 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. max 1,5% feitt |
| 0403.10.53 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. max 27% feitt |
| 0403.10.59 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. yvir 27% feitt |
| 0403.10.91 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. max 3% feitt |
| 0403.10.93 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. max 6% feitt |
| 0403.10.99 | 20% | 2,06 kr. pr. kg. | Yogurt o.t. yvir 6% feitt |

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Fíggjarmálaráðið og TAKS mæla til at dagføra toll- og vøruskránna í skjali 1 í tolllógini. Tilmælið snýr seg um at seta nýggjastu útgávuna av toll- og vøruskránni frá WCO í gildi í Føroyum.

Hetta lógaruppskotið er fylgibroyting av, at toll- og vøruskráin verður dagførd, og snýr seg um at seta inn nýggj vørunummur í lógini um avgjald á framleiðslu og innflutning og at strika gomul vørunummur í lógini.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er galdandi løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 161 frá 20. desember 2023. Lógin hevur stytta heitið *tolllógin*. Í tolllógini er toll- og vøruskráin lýst. Harafturat er galdandi lóggáva løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning.

Føroyska toll- og vøruskráin, sum er lýst í skjali 1 í tolllógini, byggir á altjóða vøruskránna hjá World Customs Organisation (WCO), kallað Harmonized System.

Tann fyrsta vøruskráin frá WCO kom í 1988, og verður hon dagførd fimta hvørt ár. Tann seinasta dagføringin frá WCO kom í 2022. Tá WCO dagførir vøruskránna, verða nýggj vørunummur stovnað, ímeðan onnur verða strikað.

Føroyska toll- og vøruskráin varð seinast dagførd í 2021, og neyðugt er tí at gera broytingar í henni, um hon skal samsvara við nýggjastu útgávuna frá WCO.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við hesum lógaruppskotinum er at dagføra vørunummur í lógini um avgjald á framleiðslu og innflutning. Hetta er neyðugt í sambandi við, at toll- og vøruskráin í skjali 1 í tolllógini verður dagførd.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum verða vørunummur í lógini um avgjald á framleiðslu og innflutning dagførd. Hetta er neyðugt í sambandi við, at toll- og vøruskráin í skjali 1 í tolllógini verður dagførd.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Umframt at hava ligið alment frammi á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri, er uppskotið eisini sent til ummælis hjá hesum hoyringspørtum:

- TAKS
- Føroya Arbeiðsgevarafelag (Vinnuhúsið)
- [-]

Fíggjarmálaráðið móttók ummæli av lógaruppskotinum frá [-] og [-].

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at fíggjarligar avleiðingar eru av lógaruppskotinum fyri land ella fyri kommunur

Tó kann verða nevnt, at verður føroyska toll- og vøruskráin *ikki* dagførd við ávísum millumbilum, verður alt føroyska tolløkið, sum frálíður, sera torført og tungt at umsita. Sum frálíður, hevði hetta merkt, at inntøkurnar á tolløkinum høvdu minkað.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Verður lógaruppskotið samtykt, fer tað at lætta um umsitingina av øllum tolløkinum. Hetta er serliga galdandi fyri umsitingina av tolløkinum hjá TAKS.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar við sær fyri kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar við sær fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Føroyska toll- og vøruskráin er gjørd og uppbygd eftir leisti, sum er ásettur av altjóða felagsskapinum World Customs Organization (WCO), sum varð stovnaður í 1952. Felagsskapurin WCO er fyri sjálvstøðugar statir. Danmark gjørdist limur av WCO við stovnan og er limur í WCO vegna kongsríkið Danmark. Tolldeildin á TAKS fylgir leistum, mannagongdum og leiðreglum, sum eru og verða ásettar av WCO á tolløkinum, undir hesum ásetingum innan toll- og vøruskránna.

Føroyar hava sambært sáttmála frá 1. februar 1992, sum seinast er broyttur í 1997, við Evropiska Samveldið, samtykt at nýta nomenklatur tollsamvinnuráðsins "Harmonized Commodity Description and Coding System" sum toll- og vøruskrá.

Lógaruppskotið fylgir altjóða sáttmála um at nýta nomenklatur tollsamvinnuráðsins "Harmonized Commodity Description and Coding System" sum toll- og vøruskrá. Aðrir millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for

Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15.september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Í §1 verður ásett, at skjal 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning verður broytt sum ásett í skjali 1. Skjal 1 ásetir, hvørji vørunummur verða sett inn og hvørji verða strikað í frumskjølunum 1 og 3 til toll- og vøruskránna í skjali 1 til løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi 1. juni 2025.

Fíggjarmálaráðið, 20.01.2025.

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni A. Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: